tíðindablaðið
sosialurin

Nr. 130 Mikudagur 12. juli 1995 | 69. árgangur | Krónur 7.00

## Ísakalt millum Ingeborg og Óla

# Tey tosa ikki saman



– Hevði eg vitað at tað fór at gerast tílíkt hundalív, hevði eg aldrin farið upp í hetta, sigur Óli Jacobsen, sum ikki hevur tosað við Ingeborg Vinther síðani í mars mánaði síða 6



---

Judith Neish, oljuráðgevi, um seismikk-kanningarar:

# Úrslitini eru áhugaverd og lovandi

síða 8 og 9



**Út frá teimum upplýsingum, sum vit hava verið før fyri at fáa frá løgunum undir basaltinum, so eru kanningarúrslitini bæði áhugaverd og geva vónir, sigur Judith Neish, sum er ráðgevi hjá føroysku oljufyrisitingini**

*Judith Neish, ráðgevi hjá føroysku oljufyrisitingini:*

# – Avgerandi at forða fyri mistøkum



Judith Neish skal tryggja, at føroyingar fáa tær kanningar, sum biðið er um. Mynd kalmar

*Tað gongur tann rætta vegin, hóast tað gongur spakuliga. Vit mugu vera sera varin ikki at gera mistøk, tí tey kunnu koma okkum aftur um brekku.*

*Hetta sigur Judith Neish, sum er ráðgevi hjá føroysku myndugleikunum í sambandi við oljukanningarnar. Hon er annars nøgd við gongdina higartil og sigur, at kanningarúrslitini eru áhugaverd og geva einum vónir. Tíðindablaðið Sosialurin hevur tosað við hana*

Í góð og væl hálvtannað ár hevur Judith Neish verið knýtt at føroysku oljufyrisitingini sum ráðgevi. Hon er útbúgvin geofysikkari og hevur seinastu 20 árini arbeitt sum ráðgevi í oljuvinnuni.

Sosialurin skilur, at hon er nógv eftirspurd og høgt vird fyri sítt arbeiði.

**Úr Oregon**

Hvør er so henda Judith Neish og hvat tekst hon við í Føroyum?

Hon er úr statinum Oregon í USA, men hevur stóran part av lívi sínum búð og arbeitt í Skotlandi, har hon hevur sítt egna ráðgevaravirki.

Tá føroyskir myndugleikar fyri nøkrum árum síðani fóru undir fyrstu fyrireikingarnar til at kanna, um olja og gass er í undirgrundini, varð ásannað, at her var talan um eina fyri føroyingar so nýggja og fløkta verð, at rætt var beinanvegin at fáa sakkøna ráðgeving frá onkrum royndum útlendskum serfrøðingi. Valið fall á Judith Neish.

Hon hevur síðani verið ráðgevi hjá bæði fyrisiting og ráðleggingarnevnd í teimum mongu spurningunum, sum hava tikið seg upp. Her kanska serstakliga fyrireikingini av forkanningunum ella seismisku kanningunum.

Av tí at hetta var fyrsta stóra stigið á longu leiðini fram móti eini møguligari komandi oljuvinnu var tað rættiliga avgerandi ikki at gera mistøk. Og tað skuldi so m.a. Judith Neish forða fyri.

Nú Western hevur skotið seismikk á føroyskum øki í bæði 1994 og 1995 hevur Judith fyri tað mesta verið við umborð á seismikkskipunum. Men hon hevur so eisini verið á oljufyrisitingini.

Arbeiði hennara er m.a. at tryggja, at føroyskir myndugleikar fáa tá vøru, sum avtalað er við Western og sjálvir at kunna vera við í arbeiðinum. Her skulu so útbúgving og drúgvu royndir hennara við seismikki koma Føroyum til góða.

**Tvey seismikkskip**

Í hesum døgum er Judith stødd á Debesartrøð. Tann 10. juli kemur seismikkskipið Polar Princess á Havnina, og hon fer við. Skipið skal hjálpa hinum Westernskipinum, Western Hercules, at gera seismisku kanningarnar lidnar.

Tað merkir, at tað fara at vera tvey skip í hesum kanningum í juli og august. Roknað verður á henda hátt við at fáa arbeiðið liðugt, áðrenn heystið kemur og baldrutt kann gerast á sjónum.

Hesa tíðina er Turið Madsen, sum er føroysk og útbúgvir seg til jarðfrøðing, við Western Hercules, har hon fylgir tí seismiska arbeiðinum.

Sosialurin hevur hitt Judith Neish á oljufyrisitingini og spurt hana, hvussu arbeiðið gongur.

Hon sigur, at arbeiðið hevur gingið væl, men tað hava verið nógvir trupulleikar í samband við tjúkku basaltfláirnar.

**Langt á mál**

-Tað er framvegis langt á mál, og vit hava enn nógvar trupulleikar, sum skulu loysast, áðrenn tú kanst fara víðari og siga nakað meira neyvt.

Hóast tað hevur eydnast at "siggja" niður gjøgnum basaltið, veit tú ikki rættiliga, hvat tú hevur við at gera har, og tað fær tú bert vissu fyri við at bora.

Men fyrstu upplýsingarnir frá føroysku undirgrundini minna um tey frá bæði Jan Mayen og Vøring basengunum í Noregi og Hatton Rockall-økinum sunnan fyri Føroyar.

Ju, tað gongur tann rætta vegin, hóast tað gongur spakuliga. Vit mugu vera sera varin ikki at gera mistøk, tí mistøk kunnu koma okkum aftur um brekku.

*-Er tað so títt arbeiði at tryggja, at tað ikki henda mistøk?*

-Umborð á skipinum, so avgjørt. Hvat viðvíkur fyrisitingini, so arbeiða vit har meira sum ein samstarvsbólkur. Vit royna at arbeiða miðvíst - eisini um hetta tekur tíð - fyri harvið at tryggja okkum, at vit fáa alt við. Tú roynir jarðfrøðiliga sæð at umhugsa allar møguleikar og ikki bert ein.

**Áhugavert og "uppmuntrandi"**

Hvat itøkiligt kann Judith Neish so siga um úrslitini av seismisku kanningunum higartil?

-Út frá teimum upplýsingum, sum vit hava verið før fyri at fáa frá løgunum undir basaltinum, so eru kanningarúrslitini bæði áhugaverd og geva vónir.

Vit vita tó ikki, hvat vit hava við at gera men kunnu í minsta lagi siggja okkurt undir basaltinum. Fyrr kundu vit einki siggja. Vit mugu so royna at finna út av, hvat tað er vit siggja.

Judith Neish heldur tó ikki, at vit út frá seismisku upplýsingum einsamøllum verða før fyri fult og heilt at siga, hvat er undir basaltinum. Til tess skal sum sagt boring til.

*-Men eru har strukturar sum kunnu goyma olju?*

-Eg veit tað ikki. Tað kann vera so nógv. Td. kunnu tað vera eldri strukturar sum teir, ið Hebridurnar eru gjørdar úr. Men vit vita tað ikki.

*-Hvønn veg ber tað?*

-Eg veit ikki og vil heldur ikki gita.

Judith Neish kann tó sig.



Judith Neish, ráðgevi greiðir leiðaranum á oljufyrisitingini, Martin Heinesen, frá seismiskum upptøkum við Føroyar. Mynd Jan

